KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 28.04.2022 kl. 17:30
Málnr.: 21/01365 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Rógvi Jacobsen, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir:
Ikki møtt:
Onnur: Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
33/22	22/00264-3	Ítróttarøkið, endurskoðan av nøvnum
34/22	22/00601-2	Dagføring av ognarbrøvum til sethúsagrundstykkir
35/22	22/00748-1	Ung í arbeiði, víðari skipan – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*
36/22	22/00753-3	Marknaumskipan við Brekkuskákið, matr.nr. 517 og 512
37/22	22/00648-3	Sundurbýti av matr.nr. 739a
38/22	22/00712-2	Sundurbýti av matr.nr. 632a ísv. neystabygging
39/22	22/00636-4	Umsókn um keyp av lendi av matr.nr. 1012
40/22	22/00646-2	Umsókn um keyp av parti av matr.nr. 802t til samanlegging við matr.nr. 932a

Til viðgerðar

33/22
22/00264-3 Ítróttarøkið, endurskoðan av nøvnum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	19.04.2022	23/22
2 Klaksvíkar Býráð	28.04.2022	33/22

22/00264-3 Ítróttarøkið, endurskoðan av nøvnum

Frágreiðing um málið:
Vísandi til samtykt Mentanarnevndarinnar frá 15. mars 2022, varð málið um endurskoðan av nøvnunum "Leikvøllurin á Másheyggi" og "Vøllurin við Djúpumýru" lagt fyri Gøtunavnanevndina aftur tann 8. apríl 2022:

Gøtunavnanevndin sær nøvnini **Másheygur** og **Djúpamýra** sum snøggari, sterkari, greiðari og brúkaravinarligari enn nøvnini "Leikvøllurin á Másheyggi" og "Vøllurin við Djúpumýru", sum tykjast long og tung.

Uppskotini eru ein uppdatering av verandi nøvnum á báðum uttandura anleggunum í økinum, samstundis sum nevndin sær eina foreinkling av nøvnunum sum bæði frískliga og meira tíðarhóskandi. Hetta m.a. tí at heitini "vøllur" og "breyt" ikki longur eru partur av sjálvum navninum.

Ein síðuvinningur til navnabroytingina er, at tað slepst undan fyrisetingunum "á" og "við" sum ofta vera brúktar hvørt um annað.

Við at stytta/broyta bæði nøvnini samstundis og kunngera tey í senn, kann hetta vera við til at vísa á, at ítróttarøkið flytur seg og fylgir við tíðini, - ikki bara við stórum útbyggingum, men eisini, tá tað kemur til nøvn og profilering annars av økinum.
...
Nevndin hevur áður umrøtt innkomið navnauppksot frá 17. okt. 2019. - Í hesum føri mælir nevndin til, at undangongumaðurin Guttorm Sørensen verður heiðraður á ein virðiligan hátt við t.d. einum minnismerki á økinum, og at ein nevnd við t.d. umboðum úr familjuni, rennifelagnum og kommununi verður sett at útinna hesa verkætlan.
...

Niðurstøða:

- Nevndin er sannførd um, at stytting av nøvnunum báðum er til tað betra fyri økið
- Nevndin metir ikki, at nøvnini broyta ella gera seg inn á verandi samleikar í økinum
- Nevndin metir nøvnini virða gomlu staðarnøvnini í økinum
- Nevndin metir nøvnini vera meira fevnandi og neutral í eini tíð, har alkyns ítróttagreinar búleikast í økinum
- Nevndin sær nøvnini sum eitt hóskandi "brand"/amboð til at varpa ljós á økini. – Nøvnini eru vælegnað til - á ein snøggan og tíðarhóskandi hátt - at miðla virksemið á økjunum í tí almenna rúminum t.d. við ljósskeltum, á ítróttarklæðum, á digitalum plattformum v.m.

<u>Lógargrundarlag:</u>
Kommunufulltrúin

<u>Tilmæli</u>:
Við grundarlagi í omanfyrinevnda mælir Gøtunavnanevndin til at:

"Leikvøllurin á Másheyggi" broytir navn til **Másheygur**
"Vøllurin við Djúpumýru" broytir navn til **Djúpamýra**

<u>Mentanarnevndin 19. apríl 2022:</u>
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-04-2022.
Nevndin tekur undir við, at bólkur verður settur við umboðum fyri Treysti, familjuna og býráðið, og velur Signhild V. Johannesen sum umboð fyri býráðið, og at fyrisitingin veitir skrivstovuhjálp.
Miðað verður eftir, at hetta verður avdúkað áðrenn 01-07-2022.

Klaksvíkar Býráð 28. apríl 2022:
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá JS: "Mælt verður til at taka undir við samtyktini í mentanarnevndini 19-04-2022 men at varðveita navnið *Vøllurin við Djúpumýru*". Tað fall við 1 atkvøðu fyri (JS) og 4 atkvøðum ímóti (KHJ, GvK, ASJ og JCC); OáL, EÓP, RJ, SVJ, TJL og ÓML atkvøddu ikki.
Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá MeN 19-04-2022; tað varð einmælt samtykt.

34/22
22/00601-2 Dagføring av ognarbrøvum til sethúsagrundstykkir

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	20.04.2022	45/22
2 Fíggjarnevndin	26.04.2022	25/22
3 Klaksvíkar Býráð	28.04.2022	34/22

22/00601-2 Dagføring av ognarbrøvum til sethúsagrundstykkir

Frágreiðing um málið:
Í samband við at nýggj løgtingslóg um keyp av fastogn er komin í gildi, hevur verið neyðugt at gera ískoyti til verandi ognarbræv hjá kommununi.

Lógin hevur við sær, at tað bara eru
- persónar, sum hava fastan bústað í Føroyum ella áður hava búð í Føroyum í samanlagt 5 ár, ella
- ríkisborgarar, sum hava búð í ríkinum í samanlagt 5 ár, ella
- feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar, sum hava høvuðssæti í Føroyum,

sum kunnu keypa fasta ogn í Føroyum uttan loyvi frá landsstýrismanninum.

Ein avleiðing av lógarbroytingini er, at øll ognarheimildarskjøl, t.e. skeytir, ognarbrøv, skiftirættarváttanir, sum eru latin til tinglýsingar frá 14. desember 2021 at rokna, skulu innihalda eina av hesum váttanum.

Av tí at mann skuldi gera hetta ískoytið til ognarbrævið, hevur fyrisitingin gjøgnumgingið verandi ognarbræv og vil vísa á tørvin at gera nakrar tíðarhóskandi tillagingar (sí hjálagt ognarbræv 2019). Til dømis:
- mett verður, at nøkur punkt kunnu ganga út, tí bygningskunngerðin vísir á somu og meira tíðarhóskandi krøv
- greiðari útsøgn um endurgjald við innlating av grundstykkjum
- rundari orðing viðvíkjandi vatni og vætu á grundstykkinum
- tíðarlinja fyri bygging sigur, at ein skal byrja húsabygging innan 1 ár, áður stóð 10 mánaðir. Og bygging skal verða liðug innan 3 ár, áður stóð 2 ár. Fá fólk megna at standa við lidnari húsabygging innan 2 ár.

Talan er um standard ognarbræv, ið verður nýtt til sølu av sethúsagrundstykkjum.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um at keypa fastogn í Føroyum
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Fyrisitingin mælir nevndini til at umrøða nýggja uppskotið og staðfesta, um nýggja uppskotið til ognarbræv skal brúkast ístaðin fyri verandi ognarbræv.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. apríl 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 12-04-2022, og mælir til, at nýggja uppskotið verður tikið í brúk.

Fíggjarnevndin 26. apríl 2022:
Nevndin tekur undir við UBN 20-04-2022.

Klaksvíkar Býráð 28. apríl 2022:
Tilmælið frá FíN 26-04-2022 einmælt samtykt.

35/22
22/00748-1 Ung í arbeiði, víðari skipan – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	19.04.2022	23/22
2 Fíggjarnevndin	26.04.2022	23/22
3 Klaksvíkar Býráð	28.04.2022	35/22
4 Klaksvíkar Býráð	25.05.2022	

22/00748-1 Ung í arbeiði – víðari skipan

Frágreiðing um málið:
Í frágreiðing frá umsitingini frá 8. apríl 2022 er greitt frá, at tørvur er á at nýskipa umsitingina av tiltakinum Ung í Arbeiði. Mælt verður til, at Virkishúsi fyri Ung ("Húsið") verður karmur um víðari skipanina av tiltakinum; hetta er leiðarin fult við uppá, tó við teirri umbøn, at tiltakið framhaldandi hevur egna játtan.
Mælt verður tí til, at játtanin til Ung í Arbeiði ikki verður flutt, men verður varðveitt á sama staði: Kontubólkur 3, rakstrarstað nr. 03241270045 *Ung í arbeiði* – hetta fyri at halda hesar útreiðslurnar leysar av fíggjarstýringini hjá Húsinum og rakstrinum har.

Lógargrundarlag:
Ung í Arbeiði er eitt átak, sum Klaksvíkar kommuna fyrstu ferð fór undir í kreppuni fyrst í níti-árunum, og var landið tá inni við lutvísum endurgjaldi til kommunurnar, sum tá valdu at seta UíA í verk. Skipanin, sum síðan tá er broytt og ment munandi her í Klaksvíkar kommunu, er eitt átak fyri allar borgarar í kommununi, sum hoyra til málbólkin, og er sostatt almannagagnligt og javnbjóðis fyri allar borgarar. Endamálið er at stuðla øllum ungum, sum ynskja tað, at finna inn á arbeiðsmarknaðin á ein góðan og mennandi hátt, og soleiðis hjálpa teimum á teirra byrjandi yrkisleið.

Fíggjarligar avleiðingar:

Tá ið samskiparin av tiltakinum fyrr í ár flutti starvsstað úr Íverksetarahúsinum og inn á Trivnaðardeildina, varð samtykt av nevndum og býráð at gera hesa flyting millum kontur:

Rakstrarstað nr.	Rakstrarstað navn	Standard kontunr.	Standardkonta	Játtan 2022	Broyting 2022	Dagførd játtan
03241270045	Ung í Arbeiði	111000	Løn, mánaðarlønt	385.000,-	-385.000,-	0,-
01111470040	Trivnaðardeild	111000	Løn, mánaðarlønt	0,-	+385.000,-	385.000,-
					0,-	

Til tess at føra játtanina aftur til Ung í Arbeiði, verður mælt til niðanfyristandandi flytingar millum kontur, soleiðis at Ung í Arbeiði fíggjarliga aftur verður skilt frá Trivnaðardeildini.

Starvsfólkadeildin upplýsir, at (nú fráfarni) samskiparin í 2022 hevur fingið samanlagt góðar 100.000 kr. í løn, men av tí at lønin er blivin bókað av rakstrarstaðnum hjá Ung í Arbeiði, so kann fulla upphæddin flytast aftur til UíA – so sum útgreinað her niðanfyri:

Rakstrarstað nr.	Rakstrarstað navn	Standard kontunr.	Standardkonta	Játtan íalt, rak.staðið 2022	Broyting 2022	Dagførd játtan, rak.staðið
01111470040	Trivnaðardeild	(111000	Løn, mánaðarlønt)	2.065.000,-	-385.000,-	1.680.000,-
03241270045	Ung í Arbeiði	(111000	Løn, mánaðarlønt)	245.000,-	+385.000,-	630.000,-
					0,-	

Við hesi flyting millum kontur kemur rakstrarstaðið Ung í Arbeiði uppaftur á fullu játtanina, sum nevndir og býráðið samtykti í fíggjarætlan býráðsins fyri inniverandi ár (2022).

Av tí at hetta er ein nýggjur leistur, sum verður royndur í eini royndartíð, har vit ikki enn kunnu vita, hvussu nógva tíð nýggi samskiparin kemur at hava tørv á til at umsita og byggja uppaftur Ung í Arbeiðið, verður mælt til – í samráð við starvsfólkadeildina – at nýggi samskiparin stemplar millum rakstararstøðini Húsið og Ung í Arbeiði, so vit á tann hátt fáa skrásett, hvussu nógva arbeiðstíð Ung í Arbeiði krevja frá hansara síðu.

Tilmæli:
Vísandi til omanfyristandandi verður mælt til, at ein nýggjur samskipari verður settur at umsita ung í arbeiði, sum eina royndarskipan í inniverandi ári, eftir tí í hesum tilmælinum tilskilaða leisti.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 19. apríl 2022:
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, dagf. 08.04.2022. Nevndin vil hava sama innihald í UíA.

Fíggjarnevndin 26. apríl 2022:
Nevndin tekur undir við B&U 19-04-2022.

Klaksvíkar Býráð 28. apríl 2022:
Signhild V. Johannesen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið frá FíN 26-04-2022 einmælt samtykt.

36/22
22/00753-3 Marknaumskipan við Brekkuskákið, matr.nr. 517 og 512

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	20.04.2022	54/22
2 Klaksvíkar Býráð	28.04.2022	36/22

22/00753-3 Marknaumskipan við Brekkuskákið, matr.nr. 517 og 512

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður tann 8. apríl 2022 um kommununnar ummæli til marknaumskipan millum matr.nr. 517 og 512, soleiðis, at ein 2 m breiður geiri, svarandi til eina gonguleið frá Brekkuskákinum til matr.nr. 512, verður marknaumskipaður frá matr.nr. 517 til 512, samstundis sum garðurin millum húsini verður galdandi matrikulmark.

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Tekniska Umsiting mælir til at viðmæla umsóknini.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. apríl 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-04-2022.

Klaksvíkar Býráð 28. apríl 2022:
Tilmælið frá UBN 20-04-2022 einmælt samtykt.

37/22
22/00648-3 Sundurbýti av matr.nr. 739a

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	20.04.2022	K-16/22
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	20.04.2022	52/22
2 Klaksvíkar Býráð	28.04.2022	37/22

22/00648-3 Sundurbýti av matr.nr. 739a

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til sundurbýti av matr.nr. 739a, soleiðis at parturin, har sethúsini standa, verður frábýttur til ein sjálvstøðugan matrikul.

Talan í hesum føri er um at býta uml. 900 m^2 frá tí 3.386 m^2 stóra grundøkinum

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:

- byggisamtyktarlig áseting: Økispartur A4 – Blandað íbúðar- og vinnuøki
- minsta mark grundøki fyri vanlig sethús: 300 m^2
- verandi parkeringspláss á ognini liggur uttanfyri ætlaða nýggja matrikulin
- nýggja/ætlaða ognin eigur uml. 1,7 m út í vegin

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

Fíggjarligar avleiðingar
Ongar – kommunan bert ummælandi partur. –
Verður tikið undir við at keypa vegalendið: kr. uml. 5.000,-, sum verður fíggjað av *Byggibúning Bústaðir – keyp av lendi*

Tilmæli:
Tekniska Umsiting mælir til:

- at viðmæla umsóknini um sundurbýti
- at kunna umsøkjaran um, at sethúsaognin skal hava í minsta lagi 2 parkeringspláss á egnum øki
- at heita á eigaran um at selja kommununi teir uml. 35 m^2, sum matrikulin eigur út í vegøkið fyri kommununnar vanliga snøklaprís uppá kr. 110,-/m^2

Tekniska Nevnd 20. apríl 2022:
Málið verið til kunningar.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. apríl 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 04-04-2022.

Klaksvíkar Býráð 28. apríl 2022:
Tilmælið frá UBN 20-04-2022 einmælt samtykt.

38/22
22/00712-2 Sundurbýti av matr.nr. 632a ísv. neystabygging

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	20.04.2022	K-9/22
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	20.04.2022	53/22
3 Klaksvíkar Býráð	28.04.2022	38/22

22/00712-2 Sundurbýti av matr.nr. 632a ísv. neystabygging

Frágreiðing um málið:
Í e-posti frá 1. apríl 2022 biður Umhvørvisstovan um býráðsins ummæli til sundurbýti av matr.nr. 632a í Klaksvík.
Talan er um frábýti av partinum Yvir á Bø, og er umsóknin framhald av matrikulumskipanum og loyvdari bygging á økinum (mál 21/00159).

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Friðingarmyndugleikarnir (loyvi frá 13. juli 2021 frá Yvirfriðingarnevndini fyriliggur)
Almenna Byggisamtyktin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert tilmælandi partur

Tilmæli:
Mælt verður til at viðmæla umsóknini, treytað av, at markini um frábýtta partin av matr.nr. 632a verða tillagað í tráð við ábygdu neystini á økinum.

Havna- og Vinnunevndin 20. apríl 2022:
Málið verið til kunningar, dagf. 20-04-2022.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. apríl 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-04-2022.

Klaksvíkar Býráð 28. apríl 2022:
Tilmælið frá UBN 20-04-2022 einmælt samtykt.

39/22
22/00636-4 Umsókn um keyp av lendi til av matr.nr. 1012

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	20.04.2022	35/22
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	20.04.2022	50/22
3 Klaksvíkar Býráð	28.04.2022	39/22

22/00636-4 Umsókn um keyp av lendi til av matr.nr. 1012

Frágreiðing um málið:
Eigarin av matr.nr. 1013 søkir um loyvi at keypa burturav kommunalu ognini – matr.nr. 1012 – svarandi til 2 parkeringspláss eftir sama prinsippi sum á matr.nr. 1011a.

Tekniska Umsiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:
Parkeringstørvurin í økinum er stórur. – Grundað á hetta upplýsir vegaumsitingin, at matr.nr. 1012 er eitt av økjunum, hugt verður eftir til útvegan av fleiri almennum parkeringsplássum. Søla burturav avmarkar natúrliga møguleikarnar við økinum.
Hinvegin er av týdningi, at lendið undir vegnum verður skrásett til kommununa.

Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Við makaskifti er uppleggið uttan peningaligt gjald millum partarnar. Útreiðlsurnar fyri matrikulering verða mettar til uml. kr. 3.000,- fyri kommununa

Tilmæli:
Vísandi til omanfyrinevnda mælir Tekniska Umsiting frá at selja burturav matr.nr. 1012 eftir prinsippinum søkt verður um, men skjýtur í staðin upp at royna makaskifti, soleiðis at matr.nr. 1013 fær tilsvarandi vídd lagda afturat framvið norðurmarkinum, sum ognin missir til veg. Við hesum fær matr.nr. 1013 uml. eina bilbreidd afturat framvið norðurmarkinum.

Tekniska Nevnd 20. apríl 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-04-2022.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. apríl 2022:
Nevndin tekur undir við TN 20-04-2022.

Klaksvíkar Býráð 28. apríl 2022:
Tilmælið frá UBN 20-04-2022 einmælt samtykt.

40/22
22/00646-2 Umsókn um keyp av parti av matr.nr. 802t til samanlegging við matr.nr. 932a

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	20.04.2022	K-8/22
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	20.04.2022	51/22
3 Klaksvíkar Býráð	28.04.2022	40/22

22/00646-2 Umsókn um ískoytisstykki til matr.nr. 932a

Frágreiðing um málið:
Eigarin av matr.nr. 932a, neystagrund við Mækjuvík, upplýsir í skrivi til kommununa 24. mars 2022, at hann hevur keypt grannastykkið, matr.nr. 931, sum hann ætlar at leggja saman við matr.nr. 932a.
Fyri at fáa norðurmarkið at flukta allan vegin, søkir hann um loyvi at keyp uml. 3 m^2 av kommunalu ognini, matr.nr. 802t. Samstundis upplýsir hann, at hann er í ferð við at ogna sær tilsvarandi vídd av matr.nr. 924.

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin
Friðingarmyndugleikarnir

Fíggjarligar avleiðingar:
Inntøka 330,- fyri sølu av 3 m^2

Tilmæli:
Tekniska Umsiting mælir til at játta nevndu umskipan treytað av at
- at lendið verður selt fyri kr. 110/m^2
- at umsøkjarin ber allar útreiðslur av matrikulering o.a.

- at kommunan verður hildin fullkomiliga útreiðslufrí av umskipanini
- at bygging á økinum verður góðkend av friðingarmyndugleikunum

Havna- og Vinnunevndin 20. apríl 2022:
Málið verið til kunningar, dagf. 20-04-2022.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. apríl 2022:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-04-2022.

Klaksvíkar Býráð 28. apríl 2022:
Tilmælið frá UBN 20-04-2022 einmælt samtykt.

Fundurin lokin kl. 18:40